## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Lot til andøvsgul av vestri og útnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 4 og 7 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Lot til andøvsgul av útnyrðingi, um kvøldið veksur hann vindin upp í ein strúk. Ælingur, seinni kavaælingur, men eisini sólglottar og hitin um dagin millum 4 og 7 stig – um kvøldið um frostmarkið.




**Veðrið sunnudagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av norði og útnyrðingi og kavaælingur, men eisini sólglottar. Hitalagið millum ÷2 og +1 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Mánadagin lot av ymsum ættum, týsdagin lækkar hann niður í útsynning. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 4 og 8 stig.

# Eivør ársins føroyingur

**Sum nakað nýtt hevur Dimmalætting skipað fyri einum tiltaki, har ársins føroyingur verður valdur. Mikukvøldið varð avdúkað, at songfuglurin Eivør Pálsdóttir sum tann fyrsti hevur vunnið hendan heiður**

ÁRSINS FØROYINGUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Fitt av fólki var komið saman á Dimmu mikukvøldið, tá ið avdúkað varð, hvør ið hevði vunnið heiðurin sum ársins føroyingur 2004. Dimmalætting hevur staðið fyri tiltakinum, og lesararnir hjá blaðnum hava havt møguleika fyri at senda uppskot inn til blaðið um persónar, ið tey meta hava uppiborið heiðurin.




*Tað vóru mamma Eivør, Sædis Eilifsdóttir, og systrarnar hjá Eivør, Elisabeth og Elinborg, sum tóku ímóti heiðursskjali og blómum í sambandi við, at Eivør Pálsdóttir var kosin ársins føroyingur.*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Umboðar Føroyar við tign

Ein dómsnevnd, mannað við Edmund Joensen, løgtingsformanni, Heðin Mortensen, ÍSF-forseta, Jenny C. Petersen, forkvinnu í LISA og Jóan Paula Joensen, professara og rektara á Fróðskaparsetrinum, hevur hugt at teimum innkomnu uppskotunum, og síðani hevur dómsnevndin tikið avgerðina um, hvør ið skuldi vinna heiðurin.

Tað gjørdist songkvinnan Eivør Pálsdóttir, sum bleiv kosin ársins føroyingur, og í sínum grundgevingum fyri at kjósa júst Eivør, segði dómsnevndin millum annað: Hon hevur sett Føroyar á heimskortið á ein sera positivan hátt, hon umboðar Føroyar við tign, hon hevur trøllabundið menniskju kring allan heim, og hon hevur fjálgað um føroyska mentan.

Eivør kundi tíverri ikki verða til staðar, tá ið avdúkingin fór fram, og tí var tað móðir hennara, Sædis Eilifsdóttir, ið vegna dóttrina tók ímóti heiðursskrivi og blómum. Sædis takkaði fyri heiðurin, ið var sýndur Eivør, og hon las síðani ein teldupost, sum Eivør hevði sent henni úr Íslandi, har hon er stødd í løtuni og venur saman við einum íslendskum orskestri.

Síðani fingu tey hjástøddu eisini prógv um, at tað ikki bert er Eivør, sum hevur góða rødd í familjuni, tí eftir handanina fóru tær báðar yngru systrarnar hjá Eivør, Elisabeth og Elinborg, upp á pallin, har tær framførdu eitt skjaldur, og hvør veit um ikki tær báðar einaferð fara at røkka eins langt og stórasysturin.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -22 |
| Nuuk | -11 |
| Qaqortoq | -11 |
| Ammassalik | -15 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | -2 |
| Seyðisfjørður | 1 |
| Tórshavn | 2 |
| Lerwick | 6 |
| Aberdeen | 8 |
| London | 9 |
| Tromsø | 1 |
| Bergen | 4 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 0 |
| Keypmannah. | 1 |
| Helsinki | -4 |
| Moskva | -8 |
| Berlin | 0 |
| Warzawa | -4 |
| Kiev | -8 |
| Bukarest | -9 |
| Paris | 11 |
| Madrid | 10 |
| Róm | 11 |
| Malorca | 14 |
| Athen | 7 |
| Malta | 10 |
| Tunis | 10 |
| Beijing | -1 |
| New Dehli | 22 |
| Bangkok | -- |
| Jakarta | 28 |
| Sydney | -- |
| New York | 11 |
| Miami | 22 |
| Los Angeles | 17 |
| Meksikobýur | 21 |
| Panama | 31 |
| La Paz | 10 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 32 |

### LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 972 hPa. í landnyrðing úr Íslandi fer eystureftir. Eitt annað lágtrýst, 1000 hPa. sunnan fyri Hvarvið fer móti Írlandi og dýpist.




**Í dag:**
Lágtrýstið vestan fyri Írland fer eystureftir og dýpist framvegis. Vestanvindurin við Føroyar minkar sum frálíður.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 09/2 kl. 06[00]–10/2. 06[00]. Hitin í gjár: 1,6°
Minsti hiti máldur í febr.: +3,7° - Mesti hiti máldur í febr.: 11,0°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 2,9 mm – mált frá 09/2 kl. 06[00]–10/2 kl. 06[00]
Avfallið higartil í februar: 41,1 mm


Brúdarlín
v/ Anniku Gaard
Fagralíð 22
Tlf./Fax. 314281
Brúðar- og brúðargentukjólar við tilhoyri til leigu
Nýggir kjólar kunnu útvegast

I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT
WWW.JAVNI.FO
JAVNI


## VESTFALLSKYRRINDI

11. februar — 7. febr. Mánin næst jørðini
12. februar — 8. febr. Tendring
16. febr. Fyrra kvarter

Kelda. Álmanakkin 2005

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 11. feb | 08.36 | 21.00 | 07.36 | 20.00 | 07.51 | 20.15 | 10.36 | 23.00 | 11.36 | - | 06.51 | 19.15 | 05.51 | 18.15 | 08.51 | 21.15 | 09.51 | 22.15 | 08.21 | 20.45 | 09.36 | 22.00 |
| 12. feb | 09.22 | 21.44 | 08.22 | 20.44 | 08.37 | 20.59 | 11.22 | 23.44 | 00.00 | 12.22 | 07.37 | 19.59 | 06.37 | 18.59 | 09.37 | 21.59 | 10.37 | 22.59 | 09.07 | 21.29 | 10.22 | 22.44 |
| 13. feb | 10.06 | 22.28 | 09.06 | 21.28 | 09.21 | 21.43 | - | 12.06 | 00.44 | 13.06 | 08.21 | 20.43 | 07.21 | 19.43 | 10.21 | 22.43 | 11.21 | 23.43 | 09.51 | 22.13 | 11.06 | 23.28 |
| 14. feb | 10.50 | 23.13 | 09.50 | 22.13 | 10.05 | 22.28 | 00.28 | 12.50 | 01.28 | 13.50 | 09.05 | 21.28 | 08.05 | 20.28 | 11.05 | 23.28 | - | 12.05 | 10.35 | 22.58 | 11.50 | - |
| 15. feb | 11.24 | - | 10.24 | 23.01 | 10.39 | 23.16 | 01.13 | 13.24 | 02.13 | 14.24 | 09.39 | 22.16 | 08.39 | 21.16 | 11.39 | - | 00.28 | 12.39 | 11.09 | 23.46 | 00.13 | 12.24 |

5 707265 100050 >